# Edmund Jensen

26.01.1987 – 07.09.2008



*Mín sonur, mín elskaði sonur,*
*Tá tú lat eygu tíni aftur, bleiv ljósið burtur í mínum lívi,*
*Tá røddin tín tagnaði,tá lærdi eg hvat pína er,*
*Tá hendur tínar blivu kaldar, tá frysti mítt hjarta.*

*Mítt hjarta er fylt við sorg,*
*Og ikki kann eg fata, at eg skal liva mítt lív uttan teg,*
*Uttan teg, sum eg ein dag føddi inn í hendan heim,*
*Men í vónini um at møta tær aftur,*
*Og takkandi Guði fyri hvønn dag, ið eg slapp at eiga teg,*
*Vil eg fara víðari,*
*Ígjøgnum sorgarinnar landskap,*
*eftir sorgarinnar veg,*
*Líka so høgt sum eg elski teg,*
*Líka so tolin vil eg bera sorgina um teg.*

*Ein dag,*
*Tá veturin er av, og tað aftur fer at vára,*
*Tá eg aftur hoyri fuglarnar syngja,*
*Tá vil eg planta eina blómu,*
*Hon skal vaksa í hitanum av mínum kærleika til tín.*

*Og um eina stund, tá hendur okkara aftur røkka hvønn annan,*
*Tá vil tú leiða meg, til tað landið, har tú bíðar eftir mær.*

**Mamman**

# Jólakonsert við Stig Rossen og Lindu Andrews



*Linda Andrews*



*Stig Rossen*

Jólakonsert verður í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 26. november kl. 20.00 við danska sangaranum Stig Rossen og føroysku Lindu Andrews.

Stig Rossen bleiv kendur, tá hann fyrstu ferð luttók í Dansk Melodi Grand Prix í 1988, og Linda Andrews vann X-Factor kappingina fyrr í ár.

Billettir kunnu keypast hjá Wellness.fo á Áarvegnum, í Norðurlandahúsinum ella á teirra heimasíðu: www.nln.fo. Billettprísurin er 370 krónur.

Sum skilst eru longu 200 billettir bílagdar, og pláss er til 400 fólk. Møguleiki verður fyri eini eykakonsert kl. 17 sama dag, sigur Martin Brodersen (tel. 223312), sum stendur fyri tiltakinum.

Fyri 25 árum síðan:

# Býarbókasavn fyri 40 milliónir krónur

Á býráðsfundi í Havn fyri 25 árum síðan varð eitt mál um bygging av nýggjum býarbókasavni lagt fram. Uppskotið fevndi um bygging av einum bókasavni millum Posthúsið og Sjómansheimið í Tórsgøtu. Palli Gregoriusssen arkitektur hevði gjørt eitt skitsuprojekt, sum tilsamans varð mett at kosta 40 milliónir krónur.

*Kelda: Sosialurin 30. august 1984*



## Brúdleyp



Leygardagin 5. sept. kl. 12.00 giftast í Skopunar kirkju Jacoba Winther og Jón Tór Baldvinsson, Skopun. Veitslan verður kl. 18.00 í Samljóð í Skopun. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 259320 ella 213777 innan hóskvøldið 3. sept.

## Prógv

Annika Pearce, Tvøroyri, hevur fingið prógv sum læknaskrivari á Bispebjerg hospitali.

## Dagurin

**4. september. Teodosia.** Navnið er helst komið upp í álmanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lotta Vest Joensen í Vági** andaðist týsdagin á Suðuroyar Sjúrkshúsi, 82 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin kl. 17 í Vágs kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Vágs kirkju. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Lottu kunnu lata Vágs kirkju eina peningagávu.